# …varaskúlum?

Tekstir: Eydna Skaale
Myndir: Sunva Eysturoy Lassen



Navn: Jóhanna av Steinum
Skúli: London College of Fashion og Central St. Martins
Ùtbúgving: Bacchelor í Fashion Knitwear
Útbúgvingartíð: 4 ár tilsamans, 2 ár á hvørjum skúla
Heimasíða: www.csm.arts.ac.uk

## Jóhanna um skúlan...

Eg var fyrst tvey ár á London College of Fashion, fyri at fáa grundina, soleiðis at eg kundi taka bacchelorútbúgvingina. Hana tók eg á St. Martins. Hon tekur vanliga 3 ár, men eg hevði so nógvar royndir, at eg slapp beint inn á 2. árið. St. Martins er ein stórur skúli, við linjum innan t.d. smúkkur, keramikk og fine arts. Á fashion-linjuni eru eisini nógvar linjur, og eg valdi knitwear-linjuna. Tað er ein dýrur skúli, men ÚSUN rindar gjaldið.

## ... um útbúgvingina

Undirvísingin snýr seg nógv um verkætlanir. Lærarin kemur inn, gevur tær evnið til verkætlanina, og so arbeiðir tú við tí. Tímarnir eru fyri tað mesta er 1:1, soleiðis, at tú fært tosað við læraran, og kann spyrja um ivamál við tekning, seyming ella sniði. Tað er nógv sjálvstøðugt arbeiði. Tá verkætlanin er liðug, er lærarin burtur, og so fært tú ein nýggjan lærara til næstu verkætlan. Hetta er ein listarlig útbúgving, sum hevur lítla og onga marknaðarliga undirvísing. Tú fært karakterir, men endaliga royndin er tað, sum avgerð alt. Tá skalt tú gera eina kollektión, sum telur 80% av samlaða karakterinum, og til eina skrivliga roynd, sum telur 20 %.

## ... um upptøku

Fyrst sendir tú eina skrivliga umsókn, har tú greiðir frá um teg sjálvan. Tú skalt eisini senda viðmæli, t.d. frá arbeiðsgevarum ella øðrum skúlum. Tú mást prógva førleika í enskum, t.d. við studentsprógvi. Fyri at verða upptikin, skalt tú hava tikið eitt grundskeið. Eg tók tað á London College of Fashion, men tað fært tú eisini tikið á St. Martins. Nógv verða so sáldað frá, og nøkur verða biðin at koma til samrøðu. Tá skalt tú vísa eina portfolio við tekningum, myndum, prøvar av onkrum bundnum o.t. So skalt tú innaftur til eina samrøðu. Her verða eisini nógv sáldað frá.

## ... um fyrimunir og vansar

Tað var keðiligt, at maskinaríið ikki altíð var í ordan. Har eru nógvir næmingar, og tí kundu tað verið betri umstøður og fleiri maskinur. Tað kundi eisini verið meiri undirvísing, men hinvegin kann tað vera ein fyrimunur, um tú ert nóg búgvin til hetta slagið av skúlagongd. Men skúlin er ótrúliga góður, og hann liggur mitt í West End í London, so tað kundi ikki verið betri. Undirvísingin er á høgum støði, og skúlin í sær sjálvum gevur stóra prestigu. Tað kundi kanska verið meiri marknaðarføring, men hevur man hug, kann man supplera. Tað gjørdi eg, og tað var fínt.

---



Navn: Inga Maria Vang Svínoy
Útbúgving: Master of arts – sniðgevi
Skúli: Accademia Italiana
Skúlatíð: 3 ár
Heimasíða: www.accademiaitaliana.it

## Inga Maria um skúlan..

Hetta er stórur skúli, við fleiri linjum innan sniðgeving, t.d. innan møblar, at pynta vindeygu, klædnasniðgeving o.s.fr. Av tí, at hetta er ein internationalur skúli, har undirvísingin er á italienskum, er eisini ein málskúli ein partur av skúlanum, so har eru nógvir næmingar.
Ein flokkur verður tikin inn ½ hvørt ár til hvørja linju, og tað eru uml. 20-24 næmingar í hvørjum flokki. Tað er ein privatur skúli, men av tí, at hann liggur í Italia, rindar ÙSUN fyri skúlagjaldið, so eg havi ikki goldið eina kr. sjálv. Harumframt fær man SU, og skúlin hjálpir til at finna íbúð, so tað er eingin trupulleiki. Man skuldi venja seg við tað italienska, men eg gekk á málskúlanum í 3 mánaðir, tá eg byrjaði, og tað hjálpti væl. Fráveran verður skrivað upp, so tað ræður um ikki at hava ov høgt prosent, júst sum í studentaskúlanum.

## ... um útbúgvingina

Tað snýr seg fyri tað mesta um at gera kollektiónir, so man teknar nógv øll trý árini. Men fyri at skilja hvussu tú skalt tekna, t.d. hvar innsnitt o.t. skulu vera, er neyðugt, at tú kennir alla heildina, og at tú eisini dugir at seyma. So tað verður tikið heilt frá grundini. Tað er strævið, og tú hevur nógv at gera, eisini í frítíðini. Tað er ikki ein serliga handilslig útbúgving, so um tú ætlar tær beint á marknaðin, so er best, at tú finnur tær ein makkara, sum hevur skil fyri tí. Sum t.d. Guðrun og Guðrun gera.

## ... um upptøku

Fyrsta árið er ikki upptøkuroynd. Eg haldi, at øll sleppa inn 1. árið. Men 2. og 3. árið skalt tú vísa onkra serliga uppgávu, eina bók við tekningum ella okkurt, tú hevur seymað. Tú skalt veruliga gera nakað fyri tað, um tú ætlar tær víðari. Men um tú gert ein innsats gjøgnum árið, so er einki problem. Og um lærararnir síggja, at tú gert nakað fyri tað, so eru teir eisini fúsir at hjálpa.

## ... um fyrimunir og vansar

Um tú ikki hevur lætt við at læra mál og ikki trívist í eini fremmandari mentan, so er tað nokk ein vansi. Annars dugi eg ikki at síggja nakran annan vansa. Tað er lítið av marknaðarføring o.t., men var ov nógv av tí, trúgvi eg, at tað hevði dripið mín skúlahug. Eg tími at seyma og tí valdi eg hendan skúlan. Ein fyrimunur fyri meg var, at eg fekk so ómetaliga nógv annað enn bert skúlan. Landið er so spennandi –serliga tá tú arbeiðir við móta, og havi fingið nógvar internationalar vinir. Hetta var júst tað, eg droymdi um, og tí havi eg so lítið ringt at siga.